# 25% færri fiskidagar



**TILMÆLI**

*Havstovan mælir til, at fiskidagarnir fyri komandi fiskiár verða skerdir við 25% - sum saman við øðrum ásetingum skulu verða liður í eini ætlan at stilla veiðitrýstið rætt, sum stovnurin sigur*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

**... flestu undanfarin ár hevur tað verið so, at Havstovan mælir til stórar niðurskurðir, meðan fiskidaganevndin plagar at mæla til óbroytt fiskidagatal...**

um stovnarnir verða so smáir – ella so illa fyri – at vandi er fyri, at eingin líkinda tilgongd kann spyrjast burtur úr.

### Sama fiskidagatal

Um nakrar dagar fer fiskidaganevndin, sum eitt nú umboðar vinnuna, at koma við sínum tilmæli til landsstýrismannin, Jacob Vestergaard, um fiskidagar og um, hvussu fiskiveiðan skal skipast í fiskiárinum 2010/2011.

Tilmælið hjá fiskidaganevndini verður handað landsstýrismanninum hin 22. juni, og í seinasta lagi hin 18. august 2010 fer so Jacob Vestergaard, at leggja sítt uppskot fyri løgtingið.

Flestu undanfarin ár hevur tað verið so, at Havstovan mælir til stórar niðurskurðir, meðan fiskidaganevndin plagar at mæla til óbroytt fiskidagatal, tó við verandi avmarkingum og tekniskum ásetingum, sum longu eru í lógini um vinnuligan fiskiskap og teimum kunngerðum, sum eru nýttar at hesi.

Nýggja fiskiárið byrjar hin 1. september 2010 og endar 31. august í 2011.

*vilmund@sosialurin.fo*



*Enn einaferð kann fiskiflotin rokna við, at fiskidagarnir verða skerdir nøkur prosent aftrat*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

# Tillaging av dagaskipan

**FISKIDAGASKIPANIN Havstovan mælir til líðandi tillaging av fiskidagaskipanini. – Vit meta, at okkara tilmæli fer at hava gagnliga ávirkan á botnfiskastovnarnar, sigur stovnurin í sínum tilmæli til landsstýrismannin**

Vilmund Jacobsen

Eftir vánaliga tilgongd av toski á landgrunninum fleiri ár á rað, eru tveir árgangir, ávikavist 2008 og 2009, nú á veg, og toskastovnurin er tískil í vøkstri. Umráðandi er, sigur Havstovan, at ungfiskurin fær frið at seta til.

– Tískil eiga uppvakstrarøkini nær landi og á øðrum leiðum í størst møguligan mun at friðast fyri fiskiskap.

Veiðitrýstið eftir toski seinastu árini er mett at hava verið ov høgt, sjálvt um nógvir fiskidagar hava verið óbrúktir. ICES mælir til ein niðurskurð í veiðitrýstinum eftir toski upp á 24% fyri komandi fiskiár.

– Vit mæla hinvegin til eina ætlan tey næstu árini fyri at stilla veiðitrýstið rætt og mæla í fyrsta umfari til at skerja dagatalið 25% í mun til tað tillutaða dagatalið í verandi fiskiári.

### Hýsa illa fyri

Havstovan vísir í sínum tilmæli á, at hýsustovnurin eisini er illa fyri og hevur alla vernd fyri neyðini.

– Hóast 2009 árgangurin tykist at vera frægari enn tilgongdin seinastu mongu árini, sæst hetta ikki aftur í stovninum fyrr enn um eini tvey ella trý ár.

– Rættast hevði verið at banna allari beinleiðis veiði eftir hýsu og at minka mest møguligt um hjáveiði av hýsu í øðrum fiskiskapum. Men hetta er trupult, tí hýsa verður fyri tað mesta veidd í einum blandaðum línufiskiskapi eftir toski og hýsu, og toskastovnurin er so væl fyri, at hann tolir ávísa roynd.

Havstovan metir tó, at tann ætlan, ið stovnurin nú skýtir upp við 25%-skerjingum av dagatali og øðrum ásetingum, eisini fer at hava gagnliga ávirkan á hýsustovnin.

### ICES endurskoðar

Upsastovnurin er hampiliga væl fyri, og gýtingarstovnurin er mettur at vera oman fyri minst tilrádda markið hjá ICES. Hinvegin er veiðitrýstið eftir upsa 38% størri, enn mælt verður til.

Havstovan sigur, at ICES í løtuni endurskoðar hægst tilmælta veiðitrýst fyri upsa.

– Vit meta, at tann ætlan, ið her verður skotin upp at stilla dagaskipanina rætt við at minka líðandi um dagatalið, eisini fer at hava gagnliga ávirkan á upsastovnin, sigur Havstovan í sínum tilmæli til landsstýrismannin í fiskivinnumálum.

*vilmund@sosialurin.fo*